# Fyrsta steypafinala hjá ÍF

**ÍF-kvinnurnar vilja ikki átaka sær leiklutin sum favorittur leygardagin**

STEYPAFINALAN
*Páll Holm Johannesen*

Flogbóltskvinnurnar hjá ÍF skulu fyri fyrstu ferð royna seg í eini steypafinalu leygardagin. Í løtuni liggja tær á øðrum plássi í landskappingini, men kortini vilja tær ikki átaka sær leiklutin sum favorittur í steypafinaluni.

– Hóast vit hava havt gott tak á TB í ár, so er ongin favorittur leygardagin, tí alt kann henda í eini finalu, sigur Annika Rasmussen úr ÍF.

Annika sigur tær eru sera spentar til finaluna, og tær hava góðar vónir undan dystinum.

-Vit ætla gera alt fyri at vinna dystin, og fáa vit okkara spæl at hanga saman, so skuldi verið góðar fortreytir fyri tí, sigur miðjan á ÍF-liðnum

Spurd um hon metti steypafinaluna vera tað størsta innan flogbóltin, svaraði Annika, at tað er tað blivið til seinastu árini.

– Tað hevur stóran týdning fyri flogbóltin, at fjølmiðlarnir gera so nógv burturúr, og tað er eisini stuttligt fyri spælararnar, at tað verður gjørt so nógv burturúr, sigur Annika Rasmussen at enda.

# Nýkosin landsliðsleikari brotið skinnabeinið

**Bárður Mortansson verður tí ikki við á venjingarleguni hjá landsliðnum í Spania**

LANDSLIÐI
*Páll Holm Johannesen*

Nýggi landsliðsleikarin, Bárður Mortansson, úr B36 var so óheppin at bróta skinnabeinið undir venjing týskvøldi.

Tað var eitt hendiligt óhapp, sum hevur við sær, at Bárður Mortansson má binda frið í fýra vikur. Tað verður sagt, at brotið var reint, og tí skuldi kviki B36-leikarin kunna byrja venjingina aftur um góðan mánað.

Hetta má kennast svárt hjá kvika B36-leikaranum, sum júst var úttikin til venjingarleguna hjá landsliðnum í Spania.

Bárður stóð seg so mikið væl á B36-liðnum í fjør, at boð vóru eftir honum til landsliðsvenjing í januar. Landsliðsvenjingarnar mugu hava gingið væl, tí Bárður Mortansson var ímillum teir 20 leikararnar, Henrik Larsen ætlaði at hava við til Spania.

Óhepni B36-leikarin má sláa seg til tols við, at landsliðið í fyrstu atløgu má bíða.



*B36-leikarin Bárður Mortansson var so óheppin at bróta skinnabeinið undir venjing, og tí verður hann ikki við á venjingarleguni hjá landsliðnum í Spania*
*Mynd: Savnsmynd*

Gudrid Nolsøe:

# -FM størri enn steypakappingin

**Hóast TB hevur tapt allar tríggjar dystirnar ímóti ÍF í ár, so er steypafinalan leygardagin víð opin, sigur Gudrid Nolsøe.**

STEYPAFINALAN
*Páll Holm Johannesen*



*Leikandi venjarin hjá TB, Gudrid Nolsøe, sigur at steypakappingin kann gerast einasti møguleiki hjá TB at vinna nakað í ár.*
*Mynd: Savnsmynd*

Leikandi venjarin hjá TB, Gudrid Nolsøe, heldur at tað at vinna FM er størri enn at vinna steypakappingina.

– Fyri Flogbóltssambandið eru steypafinalurnar nakað heilt serligt, men hjá okkum sum felag, er FM tað fremsta máli, sigur Gudrid Nolsøe undan steypafinaluni leygardagin.

TB-kvinnurnar vunnu greipuna í fjør, meðan tað hevur gingið eitt sindur striltið í ár.

– Vit hava framvegis møguleika at vinna FM, men tað verður torført. Vit mugu tí leggja nógv fyri leygardagin fyri at vinna steypafinaluna, tí tað kann gerast einasti møguleiki hjá okkum at vinna nakað í ár, greiðir Gudrid frá.

TB hevur tapt allar tríggjar dystirnar ímóti ÍF í ár, men tað væntar Gudrid ikki hevur so stóran týdning leygardagin.

– ÍF hevur verið við yvirlutan í ár, men finalur eru nakað serligt, og tí er dysturin víð opin, sigur leikandi venjarin hjá TB

Gudrid sigur seg hava góðar vónir undan dystinum, og væntar at siggja nógvar suðuroyingar í høllini á Hálsi leygardagin. Ætlanin er at koma norður til Havnar fríggjakvøldið, har tær síðstu fyrireikingarnar verða gjørdar undan dystinum leygardagin.

# Ongin úttikin fyri Bárð enn

**Tað liggur ikki fyri hjá Fróða Benjaminsen at vera í Spania. Í hansara stað er Hans Fróði Hansen úttikin**

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Eftir beinbrotið hjá Bárði Mortansson, skal nýggjur maður finnast í hansara stað á landsliðnum. Landsliðið fer til Spania fríggjadagin, og væntandi verður nýggjur leikari funnin seinni í dag.

## Hans Fróði við

B68-miðvallarin, Fróði Benjaminsen boðaði týsdagin frá, at hann ikki verður við á venjingarleguni kortini. Fróði er bundin av skúlanum, og tað liggur ikki fyri at vera burtur hesaferð.

Í hansara stað er B68-verjuleikarin, Hans Fróði Hansen, úttikin Hans Fróði kundi upprunaliga ikki fara á venjingarleguna vegna arbeiðið, men nú liggur so fyri kortini.



*Hans Fróði Hansen fer kortini við landsliðnum til Spania fríggjadagin*
*Mynd: Savnsmynd*



# Góð føroysk úrslit á internetinum



*Gunnar Mouritsen (t.v) og Høgni Vesturklett (t.h) vóru báðir við á føroyska bridgeliðnum, sum stóð seg frágera væl í kapping á internetinum um vikuskiftið*
*Mynd: Savnsmynd*

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Sunnukvøldið 9. februar var ein landsliðskapping í bridge spæld á internetinum. Spælt var inni á Swangames, eitt danskt - amerikanskt bridgefelag á internetinum, sum hevur játtað at skipa fyri millumtjóða venjingarkappingum. Hetta kvøldið luttóku trý føroysk lið, tvey úr Danmark, eitt úr Estland, Libanon og Kekkia. Leiktir vóru 7 dystir á 4 spøl, og í einari spennandi kapping mundi tað eydnast tí eina føroyska liðnum, Føroyar 1, at vinna kappingina. Libanon vann kappingina, og tey føroysku liðini endaðu sum nr 2, 4 og 6. Hetta má sigast at vera eitt frálíkt úrslit, ið gevur enn eina ábending um, at Føroyar eru á veg fram í altjóða bridge høpi. Kappingin var ein liður í fyrireikingini til NM 2003, sum verður leikt í Føroyum í mai.

Teir, ið mannaðu Føroyar 1, vóru: Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen og Gunnar Mouritsen - Høgni Vesturklett

Endaliga úrslitið av kappingini á netinum var hetta:

1. Libanon
2. Føroyar 1
3. Kekkia
4. Danmark 2
4. Føroyar 3
6. Føroyar 2
7. Danmark 1
8. Estland

Tey, sum hava áhuga at vita meira um kappingina, kunnu fara inn á heimasíðuna: http://www.swangames.com/national

### Steypakappingin

Fyrsta umfar í steypakappingini er leikt. Úrslitini vóru hesi:

| heimalið | útilið | Úrslit imp |
|---|---|---|
| Jens Pauli G. Nolsøe | Carl Mikkelsen | 95-56 |
| Jórun Johannesen | Eyðun Anthoniussen | 52-128 |
| Finn Ougaard | Danny Transport | 71-74 |
| Eyðun Jakobsen | Marner Joensen | 50-96 |
| Ásla Weihe | Jóna Grunnveit | 63-106 |
| Jákup Hjaltalin | Per Kallsberg | 48-82 |

Annað umfar í kappingini skal verða liðugt leikt innan 21. februar. Teir dystirnir eru hesir:

Per Kallsberg - Jónu Grunnveit
Jens Pauli G. Nolsøe - Eyðun Anthoniussen
Reimund Langgaard - Junior Buss Taxa
Marner Joensen - Danny Transport

### FM lið kappingin

Næsta umfar í FM kappingini fyri lið í 1. deild og 2. deild verður leikt í Handilsskúlanum á Kambsdali 21. og 22. februar. Byrjað verður fríggjakvøldið 21. feb. kl. 19.30, og hildið verður fram leygarmorgunin kl. 10.00. Liðugt verður at spæla leygarkvøldið uml. kl. 19.

# Jón Rói leikti allan dystin

**Brøndby hevur vunnið allar tríggjar venjingardystirnar higartil**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Danska meistaraliðið, Brøndby, er í hesum døgum á venjingarlegu í Turkalandi. Mánadagin leikti Brøndby fyrsta venjingardystin á ferðini. Dysturin var ímóti Red Dragons úr Suður Korea, og dysturin endaði við 1-0 sigri til Brøndby.

Føroyski landsliðsleikarin leikti allan dystin í miðverjuni undir liðini á liðskiparanum Per Nielsen. Hetta var triði venjingardysturin hjá Brøndby, og higartil eru allir dystirnir vunnir. Í føroyskum eygum má tað kann kennast væl, at Jón Rói hevur verið við allar dystirnar higartil.

Hann tykist koma nærri og nærri einum føstum plássi í Brøndby-verjuni, og spennandi verður at síggja um hann verður í millum teir fyrstu ellivu, tá danska superligan aftur fer av bakkastokki um miðjan mars.

# Don Ø væntar stórt arbeiðsloysi

**Hvussu arbeiðsloysið fer at ávirka føroyskan fótbólt er enn óvist.**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Í síðstu viku høvdu vit samrøðu við HB-venjaran, Frank Skytte, sum segði seg vænta fleiri danskar fótbóltsleikarar til Føroya í framtíðini.

Orsaka stóra talinum av arbeiðsleysum fótbóltsspælarum, roknaði Frank Skytte við, at fleiri útlendskir fótbóltsspælarar fóru at kanna sær møguleikan fyri at koma til Føroya at spæla.

Í grein í ekstra-blaðnum mikudagin, sigur stjórin í FCK, Flemming Østergaard, at minst 5000 fótbóltsspælarar í Evropa fara at ganga fyri onki eftir 1. juli í ár. Ein orsøk til stóra arbeiðsloysið, sigur Østergaard verða, at flestu fótbóltsleikarar hava enn ikki skilt fíggjarligu kreppuna á fótbóltsmarknaðinum.

Um stóra arbeiðsloysið fer at ávirkan føroyskan fótbólt í framtíðini, er ilt at spáa, men eitt er vist, at tað helst fer at gerast lættari hjá føroyskum feløgum at knýta útlendskar spælarar til sín.

Røddir hava verið frammi um, at tað í fleiri dømum betur loysur seg hjá fótbóltsfeløgum- fíggjarliga, at leita sær styrk uttanlanda, tí fremstu føroysku leikararnir skulu hava nógv í løn.

Heldur kreppan á fótbóltsmarknaðinum á, so er ikki óhugsandi, at føroysku feløgini heldur fara at leggja seg eftir útlendskum leikararum, sum leikliga eru á hædd við føroysku spælararnar, men sum fáast til vega fyri ein bíligari penga.